Álit

í

løgtingsmáli nr. 50/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu (Øktar útreiðslur til verkætlanina)

Landsstýrismaðurin í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 14. februar 2023, og eftir 1. viðgerð 21. februar 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. februar og 2. mars 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, saman við Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at hækka fíggjarkarmin frá 39 mió. kr. til 43 mió. kr., soleiðis at heimið kann byggjast liðugt samsvarandi nýggju kostnaðarmetingini. Talan er um sama verklag, sum tá løgtingslógin varð samtykt í 2018.

Útreiðslan verður hildin á játtanini 12.21.6.02. Bústovnar (løgujáttan).

Annar parturin av meirkostnaðinum er av príshækkingum, øktum brunakrøvum og seinkingum í byggitíðini.

Hin parturin kemur av tillagingum, sum blivu neyðugar at gera í verkætlanina, eftir at hon varð undirskrivað, tí gjørdu sparingarnar í upprunaverkætlanini í vissan mun høvdu avleiðingar fyri neyðugar funktiónir á stovninum.

Nevndin vil vísa á, at tað undrar og er ikki nøktandi, at so lutfalsliga høgur meirkostnaður á gott 10% av byggikostnaðinum kemur fyri, eftir at arbeiðið hevur verið boðið út og er byrjað.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 9. mars 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	